# Útvarpið og sjónvarpið skulu hereftir stýrast av nevndum

**Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum, ætlar at seta stórbroytingar í verk í Sjónvarpinum og í Útvarpinum. Hann hevur nú gjørt eitt uppskot, sum hann vónar at kunna leggja fyri tingið í hesum mánaðinum**

FJØLMIÐLAR
*Áki Bertholdsen*



*Nú verða tað nevndir, sum fáa ovastu ábyrgdina av bæði Útvarpi og Sjónvarpi, sigur Torbjørn Jacobsen, landsstýrismapur í mentamálum*

Hereftir skulu tað vera fimm-mannanevndir, sum skulu hava ovastu leiðsluna fyri útvarpinum og sjónvarpinum.

Hetta er ein ætlan, sum Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum nú ætlar at seta í verk.

Hann sigur, at hann hevur gjørt eitt uppskot um, hvussu almennu fjølmiðlarnir skulu skipast hereftir.

Uppskotið um broytingar í lógini um kringvarp, varð lagt fyri landsstýrið á tí seinasta fundinum fyri jól.

– Nú er uppskotið til politiska viðgerð og spurningurin er so, hvussu flokkarnir taka undir við tí. Men eg vóni, at uppskotið kann leggjast fyri tingið í hesum mánaðinum.

Hann sigur, at eydnast tað, skuldi tað borið til at sett uppskotið í verk í vár.

## Almennir stovnar

Av tí, at uppskotið nú er til politiska viðgerð, veit Torbjørn Jacobsen ikki, hvussu tað fer at síggja út, tá ið tað verður lagt fyri tingið, ella tá ið tað verður samtykt.

Men sjálvur hevur hann lagt upp til at gera stórar broytingar á teimum báðum stovnunum.

Men talan verður framvegis um tveir stovnar. Útvarpið og sjónvarpið verða sostatt ikki løgd saman, soleiðis, sum summi hava róð framundir.

Men annars fara stórar broytingar at henda.

– Í løtuni eru Útvarpið og Sjónvarpið sjálvstøðugir stovnar undir landinum.

– Men eftir mínum uppskoti, skulu hesir báðir stovnarnar nú verða sjálvstøðugir almennir stovnar.

Samstundis er ætlanin, at ognirnar hjá hesum báðum stovnunum við ársenda 2000, skulu vera byrjanarfíggjarstøðan hjá teimum sjálvstøðugu, almennu stovnunum.

– Ein fyrimunur við tí er, at hava stovnarnir avlop í rakstrinum eitt árið, kunnu teir goyma tað til árið eftir, sum er, fellur tað aftur til landskassan.

Samstundis skal veljast ein nevnd við fimm limum fyri Útvarpið og ein fyri Sjónvarpið.

– Hvørja av hesum báðum nevndunum skal ein nevndarlimur veljast eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum. Hesin nevndarlimurin skal hava gott innlit í føroyskt mál og føroyska mentan. Ein limur við dyggum kunnleika til fjølmiðlar og fjølmiðlaviðurskifti, verður valdur eftir tilmæli frá Føroya Blaðmannafelag. Triði nevndarlimur í hvørjari nevnd verður valdur eftir tilmæli frá starvsfólkunum á hvørjum stovni.

Hinar báðar seinastu nevndarlimirnar velur landsstýrismaðurin í mentamálum eftir tilmæli frá umsitingini. Annar av teimum skal hava góðan fyrisitingarligan kunnleika og hin skal vera búskaparfrøðingur, og, ella vera roknskaparkønur.

Samstundis ger landsstýrismaðurin av, hvør skal vera formaður, og, hvør skal vera næstformaður.

## Ovastu leiðsluna

Nevndirnar vera valdar fyri eitt ár í senn.

Torbjørn Jacobsen sigur, at tað verða nevndirnar, sum koma at hava ovastu leiðsluna fyri stovnunum og at hava yvirskipaðu ábyrgdina av, at lógin um virksemið hjá stovnunum verður hildin.

Eftir tilmæli frá stjórunum, skulu nevndirnar staðfesta virksemið á stovninum og yvirskipaður meginreglurnar fyri programmpolitikkkinum. Samstundis skulu nevndirnar góðkenna rakstrarætlanirnar hjá stovnunum og hava eftirlitið við teimum.

Nevndin skal eisini seta stjóran, men tað er stjórin, sum setir øll hini starvsfólkini.

Síðani Tróndur Djurhuus fór úr starvi, hevur Jógvan Jespersen verið fyribils stjóri fyri Sjónvarpið, umframt at hann er útvarpsstjóri.

Torbjørn Jacobsen sigur, at nýggjur stjóri verður ikki settur fyri Sjónvarp Føroya, fyrrenn hendan nýggja lógin er samtykt. Sostatt verður ein tann fyrsta uppgávan hjá teirri nývaldu nevndini fyri Sjónvarpið, at seta nýggjan stjóra. Annars hevur Jógvan Jespersen játtað at halda fram, til hesar nýggju lógarbroytingarnar eru settar í verk.

## Aðalorðaskifti

Annars sigur landsstýrismaðurin í mentamálum, at ætlanin er eisini rættiliga skjótt at seta niður eina fjølmiðlanevnd, sum skal gera eitt upprit um alt fjølmiðlaøkið. Hetta heldur hann er neyðugt, tí tað henda so ótrúligar broytingar á fjølmiðla, ikki minst á tekniska økinum.

Torbjørn Jacobsen sigur, at hann miðjar eftir, at hendan fjølmiðlnevndin ger eitt upprit, sum kann elggjast fyri tingið at hava aðalorðaskifti um á vári í 2002.

# Minst helvtin av øllum sendingunum í sjónvarpinum skulu vera føroyskar



*Torbjørn Jacobsen sigur, at politikararnir mugu gera upp við seg sjálvar, hvat teir vilja við einum føroyskum sjónvarpi*

**– Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum, hevur sett sær stór mál fyri Sjónvarpi Føroya**

FJØLMIÐLAR
*Áki Bertholdsen*

– Minst 50 % av øllum sendingunum í SvF skulu vera føroyskar. Samstundis skulu allar útlendsku sendingar skulu hava føroyskan tekst. Og tað skal vera longu um tvey ár.

Hetta eru tvær av teimum stóru ætlanunum, sum Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum hevur sett sær fyri at fremja á fjølmiðlaøkinum.

Hann sigur, at hetta er ein partur av broytingunum, sum hann nú ætlar at gera í lógini um kringvarp. Uppskotið varð lagt fram á landsstýrisfundi beint fyri jól og vónandi verður tað klárt at leggja fyri tingið nú í januar mánaða, sigur hann.

Síðani vónar hann, at broytingarnar kunnu setast í verk í vár.

Hvussu landsstýrismaðurin ætlar at skipa Sjónvarpið og Útvarpið, hava vit greitt frá í aðrari grein.

Men umframt bygnaðarbroytingarnar, ætlar hann eisini, at sendingarnar hjá sjónvarpinum skulu broytast heilt nógv í næstu framtíð.

## Helvtin føroyskt

Torbjørn Jacobsen sigur, at í uppskotinum, sum hann hevur lagt fyri landsstýrið, at miðjað verður eftir, at í seinasta lagi 1. januar í 2003 skal minst helvtin av sendingunum hjá sjónvarpinum verða føroysk framleiðsla.

Samstundist skal Sjónvarpið teksta so nógvar útlendskar sendingar, sum gjørligt.

– Men málið er eisini, at 1. januar í 2003, skulu allar fremmant mæltar sendingar verða tekstaðar til føroyskt.

Hinvegin sigur landsstýrismaðurin, at hann er greiðir yvir, at so stór mál ber tað ikki til hjá sjónvarpinum at røkka við teirri fíggarligu støðu og orku, sum stovnurin nú hevur.

Tí hevur hann eisini sett í uppskotið, at tað skal bera til at stuðla virkseminum hjá sjónvarpinum við eini játtan á løgtingsfíggjarlógini.

Torbjørn sigur, at sjálvur væntar hann, at tað stóra, politiska slagsmálið verður akkurat um hetta her.

– Tann stóri spurningurin verður helst, um tað skal bera til at játta sjónvarpinum stuðul á Løgtingsins fíggjarlóg til at gera sendingar fyri.

Men hetta orðaskiftið heldur hann er neyðugt. Hann heldur, at tað er neyðugt, at politikararnir gera upp við seg sjálvar, hvat teir vilja við einum føroyskum sjónvarpi.

– Eg dugi ikki at síggja nakað sum helst endamál í at hava eitt sjónvarp í Føroyum, um tað ikki í stóran mun skal gera føroyskar sendingar, sigur Torbjørn Jacobsen.



## VIÐMERKINGAR:

# Fullveldisætlanin er farin á bláman



**Regin Eikhólm**
*Tórshavn 4/1-2001*

- men dumpaði fyrst fýra ferðir!

Landsstýrismaðurin í fullveldismálum má hava ilt í trúðvirðinum í hesum døgum, nú ”FRÁGREIÐINGIN UM 80-ÁRINI” er komin út í bók og fríkennir ríkisfelagsskapin fyri svansið í 80-árunum.

Í 1995 setti Løgtingið eina tingnevnd við 5 tinglimum, §19 nevndin, við tí endamáli at útgreina og lýsa tey viðurskifti, politiskt og umsitingarliga, sum hava verið atvoldin til skeivleikar og mistøk í 80-árunum. Tað er hetta arbeiðið, sum §19 nevndin nú hevur greitt úr hondum í einum megnarverki uppá 443 síður, og sum hon nevnir: ”FRÁGREIÐINGIN UM 80-ÁRINI”. Bókin er greitt sett upp og løtt at lesa og átti at verðið borin í hvørt hús í Føroyum til kunningar. Bókin kostar 100 kr.

Í úrskurðinum á síðu 10 sæst, at tað eru vit føroyingar sjálvir, sum hava havt ábyrgdina av, at Føroyar fóru á húsagang: ”Føroysku politikarnir vóru ikki nóg dugnaligir - teir lurtaðu ikki eftir ávaringum frá ráðgevum og frá embætisverkinum – munur var gjørdur á monnum – politiska eftirlitið sveik – landskassin varð bundin uttan lógarheimild”. Nevndin staðfestir, at ábyrgdin fyri álvarsligu skeivleikarnar og mistøkini í 80-árunum lá hjá politisku leiðsluni.

Hetta stendur greitt í andsøgn við tað, sum landsstýrismaðurin í fullveldismálum, Høgni Hoydal, annars grundar sína politisku karrieru og tilvitsku á. Hansara einvegis uppáhald ella dogmi, at tað er ríkisfelagsskapurin, sum er atvoldin til alla miseruna í 80-árunum, fær ikki viðhald í bókini.

Hinvegin sæst á síðu 104, at RÁÐGEVANDI NEVNDIN hjá danska forsætisráðharranum heilt frá 1965 áhaldandi hevur ávarað ímóti gongdini í Føroyum og enn álvarsamari hevur gjørt tað í 80-árunum.

Ráðini vóru vegleiðandi, men §19 nevndin sigur í niðurstøðuni, at nógv størri dentur átti at verið lagdur á ráðini frá donsku serfrøðingunum, sum vóru óheft av føroyskum partapolitikki og bygdu á fullgott yrkislig undirstøði, síðu 107.

## Fullveldisætlanin á bláman

”FRÁGREIÐINGIN UM 80-ÁRINI” ger av við mytuna hjá landsstýrismanninum í fullveldismálum, um at ríkisfelagsskapurin er størsti meinbogi fyri Føroyar, land og fólk. Eftir stendur søgan um eina fullveldisætlanin, sum kostaði føroysku skattgjaldarunum fleiri tíggjutals milliónir krónur, men sum reelt ongantíð hevði annað grundstøði enn sín egna skugga, og kann metast sum ein føroysk útgáva av: ”Kejserens nye klæder” ævintýrinum.

Ungi samgongutinglimurin fyri sjálvsstýrisflokkin, Jákup Sverri F. Kass, ávarar í Dimmalætting (24/11-00) ímóti sjálvdrátti hjá landsstýrismanninum í fullveldismálum og skrivar beinleiðis: ”at hansara fullveldisætlan er farin á bláman”. Hann mælir annars til hóvsemi, og at vit fyrst yvirtaka og gjalda, síðani hava fólkaatkvøðu um loysing ella samband.

Loysingarrørslan hjá landsstýrismanninum í fullveldismálum, sum umboðar 25% av Føroya fólki, minnir alt meira um ein víðgongdan átrúnaðarbólk: ”Tann sum ikki er við mær er ímóti mær”. Serliga tey mest víðgongdu hava stórar trupulleikar við ” Kejserens nye klæder” syndrominum, sum tey royna at kompensera fyri við at skýra samríkishugaðar landsmenn við alskins ókvæmsorðum so sum: landasvíkjari, quislingur, limir av 5. kolonnu, niðangrísur v.m.

Sjálvt okkara mentamálaráðharri heldur seg ikki aftur, tá talan er um at seta niðrandi eyknevni á fólk, ið ikki hava somu meining sum hann, og júst hesin eginleikin gav honum ársins neyðrakett. Enntá onkur av okkara garvaðu rithøvundum hevur í nationalromantiskum rúsi ilt við at skilja ímillum realpolitikk og sínar egnu fiktiónir.

## Beitisrættur og ríkisfelagsskapur

Okkara óavmarkaði beitisrættur í ríkisfelagsskapinum - serliga á útbúgvingarøkinum, gevur føroyingum bæði handaligan og intellektuellan førleika, og rættin til í frælsi og trygd at virka har sum hugur og evnir standa til. Men sjáldan hoyrist eitt rósandi orð frá loysingarrørsluni fyri henda beitisrættin, hóast vit í Føroyum eru uppvaksin við, at beitisrættur er ”nakað fyri nakað” – bæði á sjógvi og landi. Vit kenna tað væl frá fiskiveiðusamráðingum.

Beitisrættur í Føroyum er vanliga ein symbiosa ella samhjálp undir givnum umstøðum - øllum at gagni. Tað var gamalt at siga takk fyri nakað ein fekk og tók ímóti, og ikki at spýta gevaran í andlitið, fyri síðani at átala gevaran fyri ikki at geva nokk. Víðgongda loysingarrørslan letur sum um, at beitisrætturin verður tann sami, hóast vit fara úr ríkisfelagsskapinum. Hetta er ein órealistiskur hugsunarháttur, men gongur annars væl saman við teirra pseudo-ímynd um, at eitt ”føroyskt gen” altíð er autonomt ella sjálvstýrandi á lívsins havi, og at framburður er bert sær sjálvum fyri at takka, meðan hóttafall og niðurgongd øðrum (ríkisfelagsskapinum) at lasta!

Okkara beitisrættur í ríkisfelagsskapinum gevur okkum frælsi við ábyrgd. Flestu kendu føroyingar, sum vit heiðra ella minnast nú um stundir, standa sum lýsandi dømi um tað gevandi í hesum beitisrætti.

## Ikki bert Þ’ið ger munin

Loysingarrørslan má gera sær greitt, at íslendsku samráðingarnar í 1918 høvdu ein Altings konsensus aftan fyri seg, meðan føroysku samráðingarnar sísta ár bert høvdu ein lítlan meiriluta aftan fyri seg. Tað er altso ikki bert Þ’ið, sum ger munin millum íslendsku og føroysku loysnina.

Landsstýrismaðurin í fullveldismálum, Høgni Hoydal, tykir ikki at hava fatað henda munin, tí við íslendsku loysnini sum fyrimynd, skuldu vit havt ein Løgtings konsensus áðrenn samráðingarnar við Danmark byrjaðu yvirhøvur, men hetta hevur ongantíð verið uppá tal smb. andstøðuna. Báðir teir stóru andstøðuflokkarnir ynskja eina loysn innan fyri ríkisfelagskapin, meðan Høgni Hoydal tekur upp í saman: ”fullveldi er einasta leið”, samstundis sum hann tosar um eina breiða semju. (Dimmalætting 2/12-00).

Alt tos um eina breiða semju kann tí ikki skiljast sum annað enn kávalótir og politiskt uttan um tos. Landstýrismaðurin í fullveldismálum hevur tá saman um kemur ikki megnað at savna annað enn sínar egnu blaðgreinar og hóast fleiri tíggjutals milliónir krónur eru brúktar til at fremja ”fullveldispropaganda” fyri, so dumpaði hansara fullveldisætlan fýra ferðir á rað í farna ári, og er tí tikin av politisku skránni hjá Landsstýrinum. Í kjalarvørrinum stendur eitt spjatt Føroya fólk, sum hevur goldið ein høgan prís fyri hetta ”novicu loysingar eksperimentið”. Vanliga er loyvt einum at dumpa 3 ferðir men ikki meir?

Ein realistisk nýskipan við breiðum meiriluta liggur innan fyri ríkisfelagsskapin. Alternativið hevur júst spælt falit, tí loysingarministarin ræddist sítt egna barn! Jú mangur fæst við boga og kann ikki upp at toga!

www.sosialurin.fo

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK** Skrás.: 28-06-96 Km.: 78.000 Prísur: 174.600,- Garanti* | **TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B** Skrás.: 16-10-97 Km.: 57.000 Prísur: 98.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CAMRY 2,0 Gli** Skrás.: 10-07-91 Km.: 129.000 Prísur: 70.600,- Sýnaður 10-00 | **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 28-10-93 Km.: 141.000 Prísur: 83.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear** Skrás.: 13-06-96 Km.: 82.000 Prísur: 119.600,- Garanti* | **TOYOTA STARLET 5 HURÐAR** Skrás.: 24-02-99 Km.: 15.000 Prísur: 103.600,- Garanti** |
| **TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SEDAN** Skrás.: 24-08-95 Km.: 112.000 Prísur: 110.600,- Garanti* | **SSANGYONFG MUSSO 4X4** Skrás.: 18-12-97 Km.: 43.000 Prísur: 187.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA 1,6 Xli L/B** Skrás.: 23-04-96 Km.: 52.000 Prísur: 115.600,- Garanti* | **VW POLO 1,9 TDI STATION** Skrás.: 14-04-00 Km.: 11.000 Prísur: 149.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 CDX** Skrás.: 18-10-96 Km.: 77.000 Prísur: 108.600,- Garanti* | **VOLVO 460 SEDAN** Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 06-99 |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN** Skrás.: 30-05-94 Km.: 109.000 Prísur: 89.600,- Garanti* Sýnaður 03-00 | **HONDA ACCORD 1,8** Skrás.: 01-11-97 Km.: 53.000 Prísur: 142.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA 1,6 Xli** Skrás.: 11-06-91 Km.: 108.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 09-00 | **PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL** Skrás.: 10-01-96 Km.: 80.000 Prísur: 138.600,- Garanti* Sýnaður 09-00 |
| **TOYOTA CARINA 1,6 GL** Skrás.: 07-10-88 Km.: 208.000 Prísur: 42.600,- Sýnaður 05-00 | **PEUGEOT 406 2,0 SEDAN** Skrás.: 07-06-96 Km.: 61.000 Prísur: 127.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 26-01-98 Km.: 118.000 Prísur: 119.600,- Garanti** | **OPEL ASTRA 1,7 TURBO DIESEL** Skrás.: 31-07-96 Km.: 105.000 Prísur: 95.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B** Skrás.: 30-09-98 Km.: 52.000 Prísur: 115.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,6 I STW.** Skrás.: 03-11-97 Km.: 35.000 Prísur: 110.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN** Skrás.: 05-03-99 Km.: 34.000 Prísur: 117.600,- Garanti** | **HYUANDAI ACCENT 1,5** Skrás.: 02-01-98 Km.: 25.000 Prísur: 85.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 30-08-95 Km.: 151.000 Prísur: 100.600,- Garanti* Sýnaður 01-00 | **FORD ESCORT 1,6** Skrás.: 22-09-95 Km.: 87.000 Prísur: 74.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA LB** Skrás.: 11-08-98 Km.:17.000 Prísur: 132.600,- Garanti** | **FORD ESCORT 1,6 5 HURÐAR** Skrás.: 06-06-95 Km.: 82.000 Prísur: 72.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6** Skrás.: 19-11-98 Km.: 15.000 Prísur: 124.600,-Garanti** | **FORD ESCORT 1,8 SPORT** Skrás.: 01-08-95 Km.: 43.000 Prísur: 74.600,- Sýnaður 12-00 |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur: 114.600,- Garanti** | **FORD MONDEO TURBO DIESEL** Skrás.: 01-09-99 Km.: 44.000 Prísur: 142.600,- Garanti* |

Sosialurin - 311820

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN.
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

VØRUVOGNAR

| | |
|---|---|
| **TOYOTA HILUX 4x2 PICK-UP** Skrás.: 28-08-90 Km.: 205.000 Prísur: 46.600,- | **NISSAN KING VAN** Skrás.: 29-09-95 Km.: 85.000 Prísur: 80.600,- Garanti* |
| **MERCEDES BENZ VITO VAN** Skrás.: 23-06-98 Km.: 50.000 Prísur: 148.600,- Garanti* | **MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL** Skrás.: 11-05-00 Km.: 9.000 Prísur: 138.600,- Garanti* |

AVHEINTINGARTILBOÐ

| | |
|---|---|
| **VW TRANSPORTER V/ DUP. KABINU** Skrás.: 17-02-87 Km.: 190.000 Prísur: 5.600,- | **NISSAN KING VAN DIESEL** Skrás.: 14-01-88 Km.: 160.000 Prísur: 5.600,- |




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040